tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Ein neyðug samskipan

## *Oddagrein*

Landsstýrið hevur nú í umbúna at skipa Postverk Føroya sum ein sjálvstøðugan almennan stovn. Harafturat skulu Postverkið og Strandferðslan partvíst samskipast. Hetta er høvuðsendamálið í einum uppriti frá Vinnumálastýrinum, og á fundi mánadagin tók landsstýrið undir við hesi ætlan.

At samskipa - ella leggja hesar stovnar saman í ein stovn - er heilt natúrligt. Báðir stovnar hava við flutning at gera. Tað veri seg við fólki, farmi og øðrum at senda. Tað eru óivað mong, sum hava undrast á, at ein fyrrapart kann ein hálvtómur bilur hjá Strandferðsluni, ein hálvtómur postbilur og ein hálvtómur bussur hjá Bygdaleiðum vitja somu bygd.

Á hesum stað er áður víst á, at allur hesin flutningur kann og eigur at kunna samskipast, um vit skulu hugsa um at rationalisera almennu tænasturnar í Føroyum. Tað kann ikki vera rætt, at tveir og tríggir bilar ella bussar skulu røkja eina tænastu, sum ein ella tveir kunnu røkja. Vit kunnu ikki halda fram at »klippa« hvørjum ørðum. Skulu vit skipa Føroyar sum fullveldisríki er neyðugt at flyta fólk úr almennu tænastuvinnuni yvir í eina framleiðsluvinnu, sum fyrst og fremst virkar vørur at flyta út. Her er ikki talan um dupultar funktiónir, men um trídupultar funktiónir.

Nú eru hesir stovnar nevndir tænatustovnar. Tað eru teir í prinsippinum, men tey flestu, sum brúka hesar stovnar halda óivað, at tænastustigið kundi verið hægri. Ikki minst innan Postverkið. Eitt er at upplatingartíðirnar eru nógv skerdar. Eitt annað er, at hesin »tænastustovnur« hevur hvørki opið leygardag ella út á kvøldið ein dag um vikuna. Heldur ikki verður postur borin út leygardag. Tí kann henda, at postur verður ikki borin út í eina heila viku. Hetta hendi t. d. á páskum í ár, tá flaggdagur var dagin eftir.

Hetta kann ikki vera rætt í okkara »samskiftistíðum«. Tað er tí ikki nakað løgið í tí, at Postverkið ikki kann kappast við nýggju og privatu flutningsfeløgini. Postverkið er afturútsiglt, m. a. tí tað hevur verið ov nógv terapi og ov lítil tænasta. Harafturat forðar gamla lógin fyri, at Postverkið kann taka kapping upp á økjum, har tað ber til at vinna pening í dag. Tí er eisini neyðugt at hugsa um tænastustigið, nú hesir stovnar skulu samskipast partvíst.

At samskipa nevndu almennu stovnar er ikki nøkur nýhugsan. Hon er nevnd á hesum stað fleiri ferðir, og gamli stjórin á Strandferðsluni, Tummas Arabo, skrivaði eina panelgrein í hesum blað fyri 25 árum síðani um júst møguleikan at samskipa hesar stovnar saman við Telefonverkinum. Tað er tí at fegnast um, at nakað hendir á hesum øki nú.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Svar til Manna Persson frá Rolf

Fyrst í 70'unum var felagið FS (Føroyskir Sosialistar) so stórt, at tað hevði deildir bæði í Danmark og í Føroyum. Hóast vit hildu nakrar fáar felagsfundir, var skjótt greitt at gongdin í báðum deildunum gjørdist ymislig og at enda ósameinilig.

Í Danmark umfataði felagið fólk við sympatium bæði fyri Javnaðar- og og Tjóðveldisflokkinum (tey trúu enn at hann var sosialistiskur), og niðri atkvøddu tey eisini rættiliga ymist: SF, VS, DKP og Socialdemokratiet. Tað flotta var, at hóast hesar munir, so hildu vit saman, og royndu at formulera okkara egna politikk, bæði á altjóða økinum og tí føroyska.

Í Føroyum bleiv felagið alt meira ekstremistiskt og hevði Mao sum einasta sanna gud. Seinni meini eg at Albania og kanska Pol Pot í Kampuchea vóru stóru fyrimyndirnar.

Hetta endaði við einari uratkvøðu fyrst í 70'unum. Atkvøtt var um tað parolan skuldi vera føroyskt **sosialistiskt tjóðveldi** ella **sjálvstýri**. Í DK- deildini var stórur meiriluti fyri at siga *sjálvstýri*, men í Føroyum vildu teir hava *tjóðveldi.*

Hesin munur, saman við nógvum øðrum mótsetningum, førdi til skilna millum feløgini. Tað í Føroyum varð maoistiskt tjóðveldisfelag. Teir kallaðu seg »floksbyggjandi«, og gingu inn fyri vápnaðari kollvelting. Fundirnir byrjaðu við at formaðurin las ein tekst úr reyðubók hjá Mao, og helt eina stutta prædiku.



So, Manni, eg kann siga fyri mín part, at tey seinastu 30 árini hevur mín parola verið: Sosialisma og sjálvstýri. Tað er hon enn. Og eg meini ikki at hon stríðir ímóti stevnu Javnaðarfloksins, sjálvt um tað meira enn so er hent, at eg ikki havi kunnað góðtikið alt frá tí flokkinum. Eg eri heldur ikki limur í flokkinum.

Á jú, eg havi eisini onkuntíð skift hugsan um mangt og hvat. Í Realskúlanum í Havn høvdu fleiri góðar lærarar, sum vóru fólkafloksmenn, og tí fekk hesin flokkur altíð stóra undirtøku í klassanum, tá »prøvavalg« var uppundir Løgtingsval.

Nú spyrt tú okkum, og tað er alt í lagi, Hans Pauli og Bergur munna svara fyri seg. Men spyr teir maoistarnar, sum skrivaðu »Arbeiðið«, teir sum vildu hava vápnaða kollvelting osfr. Teir sita nógvir á samfelagsins toppi í dag, og flestir eru teir tjóðveldismenn og ganga inn fyri fullveldinum.

**Rolf Guttesen**
**23.05.00**

# Gomlu sjúkrabilarnir eiga at endurnýggjast beinanvegin

Sjúkrabilarnir eiga at verða tryggir á neyðsynjarferðum.

Sum skilst, verður nú løgd ætlan fram, hvussu sjúkrabilarnir eiga at verða skiftir út. Nakrir eru við at náa veteranaldri, og eru lítið skikkaðir at koyra neyðsynjarkoyring, ið sum øllum kunnugt, setir stór krøv til bæði bilførarar og materiel. Enn hevur ongin beinleiðis vanlukka staðist av hesum gomlu sjúkrabilum. Ein



aksil og nakrir motarar eru brotnaðir. Men spurningurin er, nær ein t.d. ein aksil brotnar í einum svingi við nógvari ferð, við tí úrsliti at sjúkrabilur fara bóltandi av vegnum. Tí um aksil og motorar brotna av elli - tá er tíðin komin at skifta allar teir gomlu sjúkrabilarnar út. Mær vitandi, farast akfør skjótari í Føroyum enn í mongum grannalondum orsakað av okkara veðurlag. Tí er onki skil í at okkara sjúkrabilar 2-3-4 ferðir so gamlir sum í øðrum londum.

Vit eiga tí at skifta allar okkara gomlu sjúkrabilar út við nýggjar Og síðan at syrgja fyri at hesir verða skiftir út eftir eini skipan, ið ger, at vit alla tíðina hava sjúkrabilar, ið eru at líta á - eisini tá ið neyðsynjarboð eru og skjótt skal koyrast.

Tað kostar og so er at gjalda.

**Marjus Dam,**
**løgtingsmaður**

# Eitt samfelag í panikstøðu

Vit hava ikki klárað at endurnýggja Strandferðsluna, sum nú má hutla seg ígjøgnum við avoldaðum ferðamanna- og farmaflutningi.

Her skulu hundra-tals milliónir nýtast, fyri at koma á eitt forsvarligt og tíðarhóskandi støði.

Vit hava ikki klárað at viðlíkahildið og tíansheldur klára at endurnýggja føroyska heilsuverkið.

Eitt totalt niðurslitið og niðurpínt heilsuverk krevur milliardaíløgu fyri at koma ájavnt við okkara grannar.

Skúlaverkið hevur milliónaíløgur og rakstrarpening fyri neyðini. Fyri fyrstu ferð í søguni hava vit havt lærararaverkfall í fólkaskúlanum.

Fær Postverkið, sum skuldi geva millióna avlop, tá yvirtøkan varð framd fyri 25 árum síðani, ikki annan bygna ella játtan á fíggjarlógini verður lykilin snaraður um fyrsta dagin.

Okkara sokallaða modernaða samfelag nøktar ikki tørvin hjá teimum gomlu, teimum rørslutarnaðu, teimum menningartarnaðu.

Snøgt sagt eitt samfelag í panikstøðu.



Henda álvarsama støða nervar ikki løgmann og varaløgmann.

Okkara landsstýri við fylgi ferðast í pendulfart millum Føroyar og Keypmannahavn, har teir í fullum álvara hava sett sær fyri, at loysa Føroyar frá hinum partinum av ríkinum.

Trupulleikarnir (ræðumyndirnar) heima á klettunum eru lagdir til viks. Nú skal alt ofrast fyri fullveldissakir.

Gud náði okkum, fáa hesir evsta vald.

Undirritaði hevur tað vón, at ongin føroyingur við sínar fullu fimm, kann verða so bláoygdur, at taka løgmann og varaløgmann fyri fult.

**Flemming Mikkelsen**

# Tey heimleysu á Landssjúkrahúsinum

Ja, tað er tíverri nógv her í høvuðsstaðnum ið eru heimleys, tá hugsi eg serstakliga um tey, ið búgva á teimum psykiatrisku deildunum úti á landssjúkrahúsinum, har nógvir av sjúklingunum hava búð í heilt nógv ár. Hetta er teirra heim og verður tað eisini framyvir.

Ein keðilig søga endurtekur seg aftur í ár. Tá verða so deildir lukkaðar í nakrar mánaðar í summar, vegna sparingar? Tey fólkini, ið búgva har, eiga sostatt einki heim í summar.

Tey verða sostatt koyrd út úr sínum egna heimi, har tey hava eina song, eitt náttborð og eitt klædnaskáp.Tey verða so flutt á aðra psykiatriska deild úti á landssjúkrahúsinum, kanska har at deila kamar við fleiri fólkum, ið tey als ikki kenna, fáa tað til tíðir vánaligt av hesum og noyðast so eisini at fáa meira heilivág.

Hetta er so støðan, ið endurtekur seg á hvørjum ári á teimum psykiatrisku deildunum á landssjúkrahúsinum, heimleysir sjúklingar. Tað hava verið nógv fólk, sum ígjøgnum árini hava roynt at steðga hesu niðurverdigu flytingini, ið fer fram á hvørjum ári, men tað sær út til, at tey ongan góðan eiga.

**Elna Nolsøe,**
**pleygari**



# Biðja donsku bisparnar um umbering

*Meginparturin av prestunum í Føroyum hava sent donskum bispum bræv, har teir siga seg vera keddar av, at nakrir ávísir føroyskir prestar hava sýtt tveimum donskum bispum at prædika í Føroyum*

John Johannessen

Nógv tann størsti parturin av kirkjufólkunum í Føroyum høvdu tikið tað sum ein heiður, at ein bispur prædikaði í kirkju teirra.

Hetta siga fimtan føroyskir prestar millum annað í skrivi, teir hava sent donskum bispum í sambandi við, at prestarnir í Klaksvík og annar av prestunum í Vesturkirkjuni hava sýtt tveimum donskum prestum at prædika í hesum báðum kirkjunum annan hvítusunnudag.

Teir fimtan føroysku prestarnir siga seg harmast um, at tríggir prestar í tveimum av teimum 60 kirkjunum í landinum hava sett seg upp ímóti, at tveir danskir bispar prædika í kirkjum teirra.

Prestarnir gera púra greitt, at donsku bisparnir eru vælkomnir at prædika í kirkjum sínum, og teir vísa eisini á, at teir eru takksamir fyri hetta.

Brævið til donsku bisparnar endar við, at føroysku prestarnir siga seg vóna, at tað, ið hent er, ikki fer at seta skør í hátíðarhaldið í sambandi við túsundárahaldið fyri, at gleðiboðskapurin varð boðaður í Føroyum.



Tórshavn, den 19. mei 2000

Til de danske biskopper.

Det er med stor beklagelse, at nedenfor anførte sognepræster på Færøerne erfarer, at 3 præster ved 2 – skriver to – af landets 60 kirker (og ikke en række færøske kirker) har modsat sig, at to danske biskopper prædiker i deres kirker 2. pinsedag. (Indsigelse fra en 4. præst, som er sygehus- og arresthuspræst, og som er ansat ved domkirken, medfører ingen ændring af den planlagte gudstjeneste i domkirken 2. pinsedag med biskop Erik Norman Svendsen).

Det er også med stor beklagelse, at vi læser Peter Birchs stort opsatte og uvederhæftige artikel om "sagen" på forsiden af Kristeligt Dagblad.

Langt, langt den overvejende del af det færøske kirkefolk vil – selv om de ikke skriver om det i avisen - betragte det som en ære, at en biskop prædiker i deres kirke.

De danske – og øvrige nordiske – biskopper er velkommen til at prædike i vore kirker, og vi siger tak til.

Vi håber ikke, at det passerede vil sætte skår i højtiden omkring 1000-års fejringen for evangeliets forkyndelse på Færøerne.

Med venlig hilsen

Meinhard Bjartalíð
Uni Næs
Jónsvein Bech
Emil Olsen
Jógvan Fríðriksson
~~Marjun Bæk~~
Martin Restorff Jacobsen
Heri Joensen
Sonja Klein
Bjarni Bæk
David Johannesen
Jákup Reinert Hansen
Ólavur Rasmussen
Petur Martin Rasmussen
Elsa Funding

AVRIT

*Øll tann føroyska prestastættin - teir fýra prestarnir undantiknir - hava sent donsku bispunum bræv við umbering fyri viðferðina, teir hava fingið frá ávísum føroysku prestum*

### Markera samkynt paraløg

Orsøkin til, at donsku bisparnir ikki sleppa at prædika í Føroyum er, at teir 28. oktober 1997 skrivaðu undir eitt skriv, sum gevur loyvi til at boða frá samkyndum paralagi í kirkjuni.

Bergur Debes Joensen, annar av sóknarprestunum í Vesturkirkjuni, sigur seg kenna seg noyddan at mótmæla, at Jan Lindhardt prædikar í kirkju síni. Hann sigur, at Jan Lindhardt, sum ovasti myndugleiki fyri kirkjuna, hevur sett prestarnar og kirkjuna í eina sera ótolandi støðu.

Niels Pauli Danielsen, annar av sóknarprestunum í Klaksvík, sigur at kirkjuráðið í Klaksvík og prestarnir hava gjørt av at boða bispi frá, at tey ikki ynskja, at Karsten Nissen skal prædika í Klaksvík, fyri at staðfesta, at tey ikki hava somu hugsan sum danski bispurin og hansara líkar.

Sóknarpresturin vísir á, at tá Karsten Nissen skrivaði undir skjalið frá oktober 1997, staðfesti hann sína hugsan. Tí heldur hann, at prestarnir í Klaksvík saman við kirjuráðnum nú kunnu staðfesta nakað annað afturímóti.

Hesum meiningum tekur Høvuðsstýrið fyri Kirkjuligu Heimamissiónina undir við. Stýrið átalar í yvirlýsing í bløðunum, at norðurlendskir bispar, ið hava góðkent samkynt paralag, eftir ætlan skulu prædika í kirkjum okkara annan hvítusunnudag.

Eisini sjúkrahús- og fongsulspresturin, Sverri Steinholm, sum er hjálparprestur í Havnar Kirkju, hevur mótmælt, at danskur bispur skal prædika í Havnar Kirkju á hvítusunnu. Men mótmæli hansara varð ikki tikið til eftirtektar. Orsøkin fyri hesum var, at hinir báðir prestarnir í kirkjuni, Bjarni Bæk og Sonja Klein, viðmæltu, at danski bispurin skal prædika í kirkju teirra.

### Ósamd prestastætt

Tað eru fýra føroyskir prestar, ið hava mótmælt, at danskir bispar prædika í kirkjum teirra, og hesir fáa stuðul frá Høvuðsstýrinum hjá Kirkjuligu Heimamissióníni.

Men hetta merkir ikki, at meginparturin av føroysku kirkjuni er ímóti, at donsku bisparnir prædika í Føroyum. Teir fimtan prestarnir, ið hava skrivað undir umberingina til donsku prestarnar, eru nevniliga restin av allari teirri føroysku prestastættini.

Afturat hesum stuðlar Føroya bispur eisini teimum fimtan prestunum. Bispur heldur nevniliga, at tað týdningarmesta er, at Kristus verður boðaður, og ikki hvør boðar hann.

Føroya bispur vísir á, at tað er skeivt av teimum fýra prestunum at tosa um bíbliutrúgvir prestar og ikki. Hann sigur, at tað jú ikki ber til hjá okkum menniskjum at siga, hvør tulkar bíbliuna rætt, og hvør ikki tulkar hana rætt.

Tískil heldur prestur, at tað, summir føroyskir prestar gera í løtuni, er at fella dóm áðrenn Kristus er komin aftur at døma um, hvør er trúgvur og ikki.

## Eingin læknastjóri á hesum sinni

John Johannessen

Bert ein umsókn kom inn til starvið sum læknastjóri á Landssjúkrahúsinum. Tí hevur starvsfólkadeildin á Almanna- og Heilsumálastýrinum gjørt av at lata vera við at seta nakran læknastjóra á hesum sinni og í staðin lýsa starvið leyst av nýggjum.

At læknastjóri skuldi setast á Landssjúkrahúsinum er ein partur av semjuni, ið varð gjørd millum Serlæknafelagið, Sjúkrasytrafelagið og Almanna- og Heilsumálastýrið um ein tvístreingjaða leiðslu á Landssjúkrahúsinum.

Avtalað var, at sjúkrahúsið skuldi stýrast av einum sjúkrarøktarstjóra við ábyrgd fyri røktini og einum lækastjóra við ábyrgd fyri tí læknaliga.

Fyri stuttum varð Marin Vang sett í starv, sum sjúkrarøktarstjóri á Landssjúkrahúsinum, men enn vantar at seta læknastjóran í starv.

Shetland Cruise 2000 summarið
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
team 85 · 31 65 11

Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag







Gisting á hotelli
úr einans ... 864,- fyri hvønn (í lágárstíð)

Gisting á vallaraheimi
úr einans ... 691,- fyri hvønn (í lágárstíð)

Privat gisting
úr einans ... 819,- fyri hvønn (í lágárstíð)

Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30

Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu

Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 - 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverdum støðum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.



Ring og hoyr nærri !

e-mail: booking@smyril-line.fo